# 400 fólk tóku ímóti Finni Fríða í bítandi kulda



*Tróndur í Gøtu og Finnur Fríði – tveir stórir »risar« – heilsast á Gøtuvík*

**Hóast tað var bítandi kalt, og fryskur hægættarvindur streyk sær oman gjøgnum Gøtudal, høvdu eini 400 fólk leitað sær oman til stórfingnu móttøkuna, tá ið nýggi og stásiligi, Finnur Fríði, fyrstu ferð legði til bryggju í Gøtu sunnudagin**

MÓTTØKA Í GØTU
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tey, sum hava ferðast niðri á bryggjuni í Runavík seinastu dagarnar, hava kanska lagt til merkis, at Tróndur í Gøtu hevur ligið við oljubryggjuna, meðan skipið er vaskað, bæði innan og uttan. Orsøkin til alt hóvastákið var, at Tróndur í Gøtu skuldi fylgja Finni Fríða inneftir Gøtuvík, nú nýggja pelagiska skipið hjá gøtumonnum nærkaðist.

Nú var løtan so komin, og ikki kann sigast annað enn, at tað vóru tveir rættiligir "risar", sum stevndu inneftir Gøtuvík hendan dagin – hin nýggi bæði longri og breiðari enn hin gamli.

Bæði skipini eru so stór og stinga so djúpt, at tað verður ikki á hvørjum degi, at tey verða at síggja á Gøtuvík.

…

Móttøkan á bryggjuni í Gøtu byrjaði við hornatónleiki, sum Nes sóknar Musikkfelag skipaði fyri. Síðan sang felagskórið, Gøta/Leirvík, tveir sangir.

Orðið varð síðan latið bygdaráðsformanninum í Gøtu, Haldóru Ranghamar, sum vegna Gøtu kommunu beyð Finni Fríða vælkomnum til Gøtu og ynskti eigarunum hjartaliga tillukku við nýggja skipinum.

- Tað er ein stór løta hjá eigarum, manning og okkum øllum í Gøtu, tá ið eitt so stórt skip kemur til bygdina. Tað fløvar at síggja eitt so vakurt skip koma siglandi inneftir víkini. Sjón gongur fyri søgn, at í Gøtu búgva framvegis menn, sum hava vilja og áræði. Vit eru øll errin av at vera gøtufólk ein slíkan dag sum hendan.

Haldóra vísti á, at tað skjótt eru 17 ár, síðan gøtufólk tóku ímóti Tróndi í Gøtu – og nú hava stórt sæð somu menn aftur tikið stig til at byggja enn eitt nýtt og stásiligt fiskifar.

– Tað varð hildið at vera djarvt at gera eina so stóra íløgu, sum Tróndur í Gøtu var, men eftirtíðin hevur víst, at menninir vóru á rættari leið. Teir vistu, hvat teir gjørdu, segði hon.

Bygdaráðsformaðurin segði, at marknaðurin setir alsamt størri krøv, og neyðugt er, at fyrilit verða tikin fyri at ganga teimum á møti. Tí er eisini umráðandi at verða so effektivur sum gjørligt, soleiðis at mest møguligt fæst burtur úr veiðini. Prísur og úrtøka mugu verða so góð sum til ber.

- Reiðaríið hevur gjørt sær stóran ómak at lúka hesi krøv og at royna at líta uppaftur longur frameftir.

Hon segði, at nýggi Finnur Fríði er eitt stásiligt skip við øllum hugsandi nútímans hentleikum, sum á nógvum økjum óiva fara at gera, at skipið kemur at standa seg væl í pelagiska flotanum.

Haldóra vísti á, at maskinorkan umboð á Finni Fríða er sera stór, og hetta verður ivaleyst ein fyrimunur á fleiri økjum – umframt, at stytt verður um tíðina til og av fiskileið. Umstøðurnar hjá manningini eru so góðar, sum tær hugsast kunnu.

- Í Gøtu hava vit drúgvar royndir og siðvenju at royna eftir uppisjóvarfiski. Síðan í fimtiárunum hava skip hiðani roynt eftir hesum fiskasløgum, og tilsamans hava skipini verið fleiri í tali. Nú hava vit so fingið eitt skip aftrat – tað nýggjasta í føroyska fiskiskipaflotanum – og við hesum styrkja vit um okkara støðu innan hesa veiði.

Og bygdaráðsformaðurin helt fram:

- Fiskivinnan er bundin av, hvør fongur fæst burtur úr tí ókenda dýpinum, sum havið er – og hvør prísur fæst fyri veiðina. Tað ásanna eisini hesir menn, sum standa aftanfyri nýggja Finn Fríða.

Haldóra vísti á, at tá ið Tróndur í Gøtu kom til landið í 1987, hevði skipið nøkur góð ár.

– Men síðan versnaði støðan so mikið nógv, at vandi var á ferð. Eigarar og manning stóðu saman og tóku neyðug og óvanlig tøk sum gjørdu, at skipið reið sjógvarnar av sær. Og somikið væl fór at ganga, at hetta legði lunnar undir nýggja Finn Fríða.

Áðrenn hon at enda ynskti eigarum og manning tillukku við Finni Fríða, las hon upp ørindi:

*Elt ikki altíð sum fyri er slóðað*
*sjálvbjargin far yvir land, yvir hav.*
*Maður skal smíða sær eydnuna góða*
*við teimum evnum, sum Skaparin gav.*

*– Góðu eigarar og manning: Hjartaliga tillukku við nýggja skipinum – og hjartaliga vælkomnir til Gøtu!*

…

Eftir røðuna hjá Haldóru var aftur felagssangur, og hesaferð var tað sangurin, Eg minnist eina mynd, sum ljóðaði í kuldaveðrinum.

Reiðarin, Jákup Jacobsen, takkaði fyri stórfingnu eisini mundi fara at spæla, tá ið skipið fór avaftur landinum! Men hóast nøkur ár vóru ógvuliga stríggin hjá felagnum – og tað rættiliga stóð á gomlum nøglum – stendur Tróndur í Gøtu í lutfalsliga lítlum peningi í dag. Gongdin vendist, og í nógv ár hevur tað gingið óføra væl hjá skipinum.

Í dag er tað ein styrkur hjá felagnum, at skipini nú eru tvey í tali, tí Tróndur í Gøtu má sigast at vera rættiliga væl undankomin. Lítið man vera at ivast í, at styrkin hjá felagnum, P/F Vinna, sum eigur Varðan (Trónd í Gøtu) og Krossbrekku (Finn Fríða), er nógv størri við Tróndi í Gøtu sum "garranti".

Leggjast kann aftrat, at mangur gøtumaður fegnast um, at Jákup, sum í fleiri ár var byggimeistari, legði



*Ein av meistarunum, Símun Pauli Jacobsen, avmyndaður saman við gentunum, Marjun og Mirjam*

Hon segði, at fólk ofta hava lyndi til at taka tað fyri givið, at slíkir menn hava áræði at fara í holt við nýggjar íløgur.

– Tað tykist so einfalt og ómakaleyst, men er eitt megnartak hvørja ferð. Hetta er eitt ódnartak, sum setir stór krøv til evni og dugnaskap hjá teimum, ið royna at fáa tað at bera til.

Haldóra takkaði reiðaríinum fyri, at felagið tók stig til at byggja ein nýggjan Finn Fríða.

– Eg takki tykkum fyri, at tit hava tað neyðuga dirvi til at taka so stór tøk. Ynski okkara er, at byrðurin verður blíður, og at tað má ganga nýggja skipinum væl.

móttøkuna og tók afturíaftur søguna um felagið, sum nú eigur tveir teir størstu "risarnar" í landinum.

Eftir at reiðarin hevði sagt nøkur orð, var aftur felagssangur.

Vit kunnu leggja aftrat, at tá ið Tróndur í Gøtu kom til landið, var reiðarin sjálvur eisini bygdaráðsformaður í Gøtu.

Tróndur var – og er framvegis – eitt stórt skip, og tað vóru ikki øll, sum høvdu so góðar vónur um, at skipið fór at megna at vera verandi í føroyska fiskiskipaflotanum.

Onkur, sum var á bryggjuni fyri 17 árum síðan, helt fyri, um hornorkestrið hamaran og burtur av fór undir skiparakstur.

Hetta hevur verið við til at skapt nógvum monnum eina góða inntøku – og serliga Gøtu kommunu góðar skattakrónur.

Aðrir, sum søgdu nøkur orð á bryggjuni í Gøtu undir móttøkuni, vóru skiparin, Arni Hansen, Torleif Johannesen og Hargar Tvørfoss.

Mannamúgvan sang eisini tjóðsangin, og meðan fólki gingu umborð á síggja nýggja og stásiliga skipið, spældi hornorkestrið.



*Dunga Jákup undir liðini á soninum, Boga, sum verður ein av yvirmonnunum á brúnni. Ytst høgru megin Lena Jacobsen*



*Feðgarnir Andre og Arne. Arne verður skipari, og Andre verður eisini ein av yvirmonnunum á brúnni*




# Fyltist við sjógvi

**Sunnukvøldið fyltist maskinrúmið á Havørnini, sum liggur á Kollafirði, við sjógvi. Neyðugt varð at boðsenda fleiri brandbilum at tøma skipið fyri sjógv**

LEKI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnukvøldið um 20.15-tíðina bað Alarmsentralurin Brandstøðina í Havn um at senda bilar norður til Kollafjarðar, tí maskinrúmið á Havørnini, sum lá við bryggju har norðuri, var rættiliga fult við sjógvi.

Brandstøðin sendi tveir stórar bilar norður, umframt at kollfirðingar komu við einum bili. Haraftrat høvdu teir nakrar smærri pumpur við sær úr Havnini.

Á Brandstøðini í Havn siga teir, at so nógvur sjógvur var í skipinum, tá ið teir komu norður, at høvuðsmotorurin var at kalla undir. Hinvegin vóru ljósmotorarnir framvegis í gongd, og teir slóknaðu ongantíð. Skipið hevði lagt seg í stýriborð og við tað, at ljósmotorarnir standa í bakborði, var sjógvur ikki komin at teimum.

- Vit hava skilt, at eitt rør varð brotnað, og tí lak skipið so illa.

Sum skilst, var tað maskinmaðurin, ið starvast umborð á skipunum, ið varnaðist lekan. Hann var farin eitt hvørt ørindi, og tá ið hann kom aftur, sá hann, at skipið hevði lagt seg í stýriborð.

- Nógv tons av sjógvi vóru í maskinrúminum, og ikki fyrr enn um 23-tíðina vóru okkara menn aftur í Havn.

Á Brandstøðini siga teir, at neyðugt var eisini at senda boð eftir einum slamsúgvara hjá Brennistøðini, tí nógv olja var í kjølinum á skipinum.

- Vit hava skilt, at slamsúgvarin var í Kollafirði til einaferð út á náttina, og ætlanin var at fara norðuraftur morgunin eftir at taka seinastu oljuna upp úr skipinum.

Ivasamt er, um skipið stóð á botni, tá ið Brandstøðin í Havn kom norður.

Tá ið tann nógvi sjógvurin var pumpaður upp úr skipinum, eydnaðist monnum at fáa tamarhald á lekanum.

Havørnin hevur leingi ligið svínabundin í Runavík, men síðan hevur skipið ligið í Kollafirði, har tað hevur røkt uppgávur fyri Vestlaks.

